# Ógvuliga vónbrotin av framferðini

**Hóast vit halda, at tørvurin er størstur í Suðuroy, ætlar landsstýrið at gera eitt sambýli til sálarsjúk í meginøkinum og tað er ómetaliga harmiligt, sigur Sinnisbati**

SÁLARSJÚK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



– Hetta harmar meg almikið.

Soffi Egholm, forkvinna í Sinnisbata, er ógvuliga vónbrotin av framferðini hjá landsstýrinum.

Landsstýrið ætlar at byggja eitt sambýli til sálarsjúk.

Sinnisbati sigur, at tørvurin á einum slíkum sambýli er nógv størstur í Suðuroy.

Men kortini hevur Almanna- og heilsumálaráðið lýst eftir húsum til sambýli í meginøkinum.

Tvær milliónir standa á fíggjarlógini í ár til eitt sambýli til sálarsjúk, men hóast Sinnisbati heldur, at tað skuldi verða í Suðuroy er altso søkt eftir húsum í Norðstreymoy ella Vágum. Hon sigur, at í sambandi við rundferðina hjá Sinnisbata kring landið í heyst, hevði hon annars skilt á Almanna- og heilsumálaráðnum, at tað hetta sambýli fór antin at verða bygt í Suðuroy, ella kanska í Klaksvík.

Hon hevði eisini skilt, at Sinnisbati skuldi vera tikið við upp á ráð, tá ið avgerðin skuldi takast um, hvar sambýlið skuldi verða.

Kortini hevur Almanna- og heilsumálaráðið søkt eftir húsum norðanfyri, uttan at spyrja Sinnisbata eftir.

– Hetta undrar meg, tí vit eru 600 limir í Sinnisbata og okkara meining átti at viga eitt sindur í slíkum føri, heldur Soffi Egholm.

*– Vit halda framvegis, at tørvurin er størstur í Suðuroy og tí harmar tað okkum almikið, at landsstýrið vit ikki eru spurd til ráðs, sigur Soffi Egholm, forkvinna í Sinnisbata*

### Ómetaliga harmiligt

– Tað, sum er hent, er ómetaliga harmiligt, sigur Soffi Egholm, forkvinna í Sinnisbata, sum er felagið hjá teimum sálarsjúkum.

– Hetta er fyrstu ferð síðani hetta landsstýrið kom til, at eitt slíkt stig er tikið, uttan at Sinnisbati er spurt til ráðs og tí er hon vónbrotin, sigur Soffi Egholm. Annars hevur samstarvið við Landsstýrið verið sera gott í seinastuni og so mikið meiri harmast hon um, at tey ikki vistu av nøkrum.

– Vit halda framvegis, at tørvurin á einum slíkum sambýli er nógv størstur í Suðuroy.

Hetta kemst serliga av, at Suðuroyggin er so langt frá meginøkinum og tað er mangan tungt hjá sálarsjúkum í Suðuroy at fara heilt til Havnar til viðgerðar.

Á økisfundi hjá Sinnisbata í Suðuroy í heyst, upplýsti hon sostatt, at Sinnisbati fór at mæla til, at tað fyrsta sambýli verður gjørt í Suðuroy.

Soffi Egholm ásannar, at Suðuroyggin er í eini serligari støðu, hvat ferðasambandi viðvíkur og hon mælir til, at tað fyrsta sambýli eigur at verða gjørt í Suðuroy, men kortini ætlar landsstýrið at gera tað inni á meginøkinum, haðani tað er ein lítil løta at ferðast til Havnar í bili.

### Suðuroy í serligari støðu

Ætlanin hjá landsstýrinum er at skipa økissálarfrøði og sosialsálarfrøði kring um í landinum.

Endamálið er, at tað skal bera til hjá sálarsjúkum at fáa ambulanta viðgerð í nærumhvørvinum heldur enn at noyðast til Havnar hvørja ferð.

Tað verður hildið, at hetta er nógv betri fyri sjúklingarnar og teirra avvarðandi.

Í hesum sambandi er eisini ætlanin at byggja sambýli til sálarsjúk ymsastaðni í landinum og á fíggjarlógini í ár eru tvær milliónir settar av til endamálið.

Í hesum sambandi verður hugsað um eitt sambýli til léttari sjúklingar, sum ikki hava fyri neyðini at vera innlagdir á psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum.

Landsstýrið hevur ætlað, at tað skal vera klárt at flyta inn í tað fyrsta sambýli fyrst í komandi ári.

Sí eisini greinina "Gera sambýli eftir eini meting um tørvin".

# Gera sambýli eftir eini meting um tørvin

**Tað er ein deild við fakfólki, sum metir um, hvar sambýli til sálarsjúk skal byggjast. Sinnisbati verður tikið við upp á ráð, men tey hava ikki avgerðina, sigur Hans Pauli Strøm**

SÁLARSJÚK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ætlanin um, hvar eitt sambýli til sálarsjúk skal gerast, verður beinleiðis løgd eftir eini meting um tørvin.

Tað sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum vísur á, at tað er ikki Sinnisbati, sum ger av, hvar eitt sambýli skal gera.

– Sinnisbati verður avgjørt spurt til ráðs, men tað er kortini Sinnisbati, sum hevur avgerðandi orðið.

Meiningin hjá Sinnisbata verður tikin við í metingunum, men tað er ikki tey, sum eiga endaligu avgerðina.

Annars vísur landsstýrismaðurin á, at hann hevur ikki fingið nakað tilmæli um, hvar eitt slíkt sambýli skal vera.

Hann vísur á, at tað deildin fyri sinnisveik undir Almanna- og heilsimálaráðnum, sum fyrireikar sambýli.

Hetta er ein deild, sum hevur til uppgávu at røkja alt økið, sum kemur undir sosialsálarfrøði.

Hetta er ein deild við fakfólki, og tað er uppgávan hjá deildini at meta um tørvin, áðrenn ein avgerð verður tikin.

Hans Pauli Strøm sigur at deildin arbeiðir í samstarvi við psykiatriska depilin á landssjúkrahúsinum, sum kennir hvønn einasta sjúkling.

Sostatt er tað ein beinleiðis faklig meting, sum avgerðin verður bygd á og avgerðin verður beinleiðis bygd á, hvar tørvurin er størstur, sigur landsstýrismaðurin.

Og tá ið søkt verður eftir húsum í Norðstreymoy ella í Vágum mugu vit ganga út frá, at hóast sinnisbati metir, at tørvurin er størstur í Suðuroy, metir deildin fyri sinnisveik, at tørvurin er størstur í Norðstreymoy ella í Vágum.

Sí eisini greinina "Ógvuliga vónbrotin av framferðini".



*– Sinnisbati verður spurt til ráðs, men tað er ikki Sinnisbati, sum hevur avgerðina, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður*